Mars 2019

betri

Tryggingartreytir

# Arbeiðstøkutrygging

betri

# Arbeiðstøkutrygging


## Lógargrundarlag 3

## Deild I Trygging av arbeiðstøkuni 3

1.0 Tryggingin fevnir um 3
2.0 Tryggingarhædd 3
3.0 Tíðarskeið 3
4.0 Tryggjaðir lutir 4
5.0 Tryggingarstaður 4
6.0 Undantøk 4

## Deild II Trygging av verandi bygningum v.m. 4

7.0 Tryggingin fevnir um 4
8.0 Tryggingarhædd 4
9.0 Tíðarskeið 4
10.0 Tryggjaðir lutir 5
11.0 Tryggingarstaður 5
12.0 Undantøk 5

## Deild III Ábyrgdartrygging 5

13.0 Tryggingin fevnir um 5
14.0 Tryggingarhædd 5
15.0 Undantøk 5

## Felagstreytir 6

20.0 Tryggjaðu 6
21.0 Felags undantøk 6
22.0 Broyting í arbeiðinum 6
23.0 Skaðafráboðan 7
24.0 Fráboðan av endurgjaldskrøvum 7
25.0 Skaðauppgerð 7
26.0 Sjálvábyrgd 7
27.0 Trygdartiltøk fyri deild I og II 7
28.0 Felags trygdartiltøk 8
29.0 Tryggingargjald 8
30.0 Uppsøgn 8
31.0 Angringarrættur 8
32.0 Fyrning 8
33.0 Onnur trygging 8
34.0 Yvirsýn 8
35.0 Kærunevnd 9

betri

# Arbeiðstøkutrygging

## Lógargrundarlag

Fyri tryggingina eru galdandi, umframt hesar tryggingartreytir og viðtøkur felagsins, tær í Føroyum galdandi lógir um tryggingaravtalur og tryggingarvirksemi.

## Deild I

Trygging av arbeiðstøkuni

### 1.0 Tryggingin fevnir um

**1.1** Tryggingin fevnir um fysiskan miss av og skaða á tryggjaðar lutir, sum henda undir arbeiðstøku- ella uppsetingararbeiðinum og sum verða staðfestir í tryggingartíðarskeiðnum, ella afturbøtingartíðarskeiðinum orsakað av óvæntaðum hendingum við niðanfyri nevndu undantøkum og sambært teim í tryggingarskjalinum nevndu treytum.

**1.2** Tryggingin fevnir harumframt um fysiskan miss av og skaða á tryggjaðar lutir sum henda undir afturbøting av manglum, sum sambært sáttmálanum fyri arbeiðstøku- og uppsetingararbeiðinum, er skylda at afturbøta og sum verða staðfestir í afturbøtingartíðarskeiðnum orsakað av óvæntaðum hendingum við niðanfyri nevndu undantøkum og sambært teim í tryggingarskjalinum nevndu treytum.

**1.3 Eldur v.m.**
Tryggingin fevnir bert um fysiskan miss og skaða av eldi v.m., um tað er nevnt í tryggingarskjalinum.

Tryggingin fevnir tá um skaðaorsøkirnar undir bygningsbruna í vinnubygnings- ella sethúsatreytunum hjá Betri Trygging.

### 2.0 Tryggingarhædd

**2.1** Hægsta endurgjald, sum Betri Trygging veitir, er avmarkað til ta í tryggingarskjalinum nevndu tryggingarhædd, við frádrátti av ásettu sjálvábyrgdini.

**2.2** Tryggingarhæddin skal svara til ásettu samlaðu tryggingarhæddina fyri arbeiðstøkuna, og undirtrygging verður gjørd galdandi um kostnaðurin av arbeiðstøkuni er hægri enn tryggingarhæddin.

**2.3** Betri Trygging skal verða fráboðað beinanvegin, um so er, at ásetti kostnaðurin fyri arbeiðstøkuna hækkar við meiri enn 30% í byggitíðini. Eftir at arbeiðið er liðugt, verður tryggingargjaldið javnað eftir tí fulla og endaliga kostnaðinum fyri arbeiðstøkuna.

### 3.0 Tíðarskeið

**3.1 Arbeiðstøkan**

**3.1.1** Tryggingin fevnir um tryggjaðu lutirnar í tí í tryggingarskjalinum ásetta tryggingartíðarskeiðnum.

**3.1.2** Tryggingartíðarskeiðið er tað í tryggingarskjalinum ásetta byggi- og anleggstíðarskeiðið, sum sambært arbeiðstøkusáttmálanum er ásett til liðugtgerð av arbeiðstøkuni. Sí um leinging í § 3.1.5.

**3.1.3** Um arbeiðstøkan heilt ella partvíst verður latin byggiharranum ella arbeiðstøkan heilt ella partvíst verður tikin í nýtslu, áðrenn tryggingartíðarskeiðið er lokið fer tryggingin úr gildi fyri tann partin ella teir partarnar av arbeiðstøkuni, sum er latin byggiharranum ella er tikin í nýtslu av honum.

**3.1.4** Hetta er tó ikki galdandi, um skaðin hendir orsakað av eini skaðahending, sum stavar frá arbeiði uppá partar av arbeiðstøkuni, sum ikki eru latnir byggiharranum ella ikki eru tiknir í nýtslu.

**3.1.5** Leinging av tryggingarstíðarskeiðnum. Tryggingartakarin skal beinanvegin boða Betri Trygging frá, um arbeiðstøkan verður latin byggiharranum seinri enn tann dagin, sum er ásettur í tryggingarskjalinum.

Tíðarskeiðið kann leingjast móti at ískoytistryggingargjald verður goldið, umframt at treytirnar møguliga verða broyttar.

Verður tíðarskeiðið ikki longt til arbeiðstøkan verður latin, er afturbøtingarfulnaðurin avmarkaður til skaðar, sum arbeiðstakarin er atvoldin til í sambandi við afturbøting.

**3.2 Afturbøting**

**3.2.1** Afturbøtingartíðarskeiðið byrjar, tá tryggingarfulnaðurin í byggi- og anleggstíðarskeiðnum endar.

**3.2.2** Afturbøtingartíðarskeiðið er ásett í tryggingarskjalinum. Tíðarskeiðið kann leingjast móti at ískoytistryggingargjald verður goldið, umframt at treytirnar møguliga verða broyttar.

**3.2.3** Afturbøtingartíðarskeiðið er tað tíðarskeiðið har arbeiðstakarin sambært sáttmála, siðvenju ella almennum

reglum hevur skyldu at bøta um brek ella manglar við arbeiðstøkuni.

## 4.0 Tryggjaðir lutir

Tryggingin fevnir um arbeiðstøkuna soleiðis, sum greitt er frá í tryggingarskjalinum,íroknað tilfar, sum er ætlað at verða partur av tí lidnu konstruktiónini. Harumframt fevnir tryggingin um fyribils arbeiði, ið verða nýtt til gerð av arbeiðstøkuni.

## 5.0 Tryggingarstaður

Tryggingin er galdandi á tí í tryggingarskjalinum nevnda arbeiðsplássi og undir innlendis flutningi hagar.

## 6.0 Undantøk

Tryggingin fevnir ikki um:

**6.1 Miss og skaða orsakað av:**
- ófulfíggjaðum tilfari
- sliti ella líðandi versning
- ófulfíggjaðari fremjing av projektering, útrokning ella konstruktión

Hetta undantakið er avmarkað til tann bygningslutin ella tað konstruktiónselementið, har luturin, sum er slitin, er ófulfíggjaður ella sum hevur brek, er ein partur.

**6.2** Miss ella skaða orsakað av ófulfíggjaðari fremjing av arbeiði, íroknað ófulfíggjaðari avstíving og yvirbreiðing.

Hetta undantakið er avmarkað til tann partin av arbeiðstøkuni, sum verður skaddur, sum ein beinleiðis fylgja av tí ófulfíggjaða arbeiðinum.

Undantakið er ikki galdandi fyri aðrar partar av arbeiðstøkuni, sum verða skaddir av fyrsta skaðanum.

**6.3** Vanliga afturbøting av manglum og brekum.

**6.4** Miss av ella skaða á tilfar hjá arbeiðstakara. Við hetta er at skilja allir lutir, ið eru framleiddir til ella vanliga verða fingnir til vega til nýtslu í meira enn einari arbeiðstøku, og tí ikki verða roknaðir í ta samlaðu tryggingarhæddina við tí fulla virðinum.

**6.5** Miss, sum vísir seg við ívanti, tá tílíkur missur bert kann staðfestast við uppgerð av roknskapi ella goymslu.

**6.6 Bót ella endurgjald fyri:**
- seinking
- vantandi liðugtgerð
- heilt ella partvíst ikki at lúka treytirnar í sáttmálanum fyri arbeiðstøkuna.

**6.7** Rakstrarmiss ella annan óbeinleiðis miss av øllum sløgum, íroknað rentumiss.

**6.8** Miss ella skaða orsakað av spreingiarbeiði.

# Deild II

Trygging av verandi bygningum, bygningsanleggum og leysafæ í bygningum.

Tryggingin fevnir bert um omanfyri nevndu lutir, um tað er nevnt í tryggingarskjalinum.

## 7.0 Tryggingin fevnir um

**7.1** Tryggingin fevnir um fysiskan miss av og skaða á tryggjaðar lutir orsakað av óvæntaðum hendingum, um so er, at tryggjaði kann prógva, at missurin ella skaðin eru ein beinleiðis fylgja av fysiskum arbeiði í sambandi við arbeiðstøkuna.

**7.2** Fulnaðurin er avmarkaður av niðanfyri nevndu undantøkum og sambært teim í tryggingarskjalinum nevndu treytum.

## 8.0 Tryggingarhædd

**8.1** Hægsta endurgjald, sum Betri Trygging veitir, er avmarkað til ta í tryggingarskjalinum nevndu tryggingarhædd, fyri skaðar, sum henda í somu skaðahending ella røð av skaðahendingum, sum hava uppruna í somu skaðahending, við frádrátti av ásettu sjálvábyrgdini.

**8.2** Talan er um eina 1. risikotrygging, t.v.s., at undirtrygging ikki verður gjørd galdandi.

## 9.0 Tíðarskeið

**Sí** § 3.0.

**10.0 Tryggjaðir lutir**

Tryggingin fevnir um tryggjaðar lutir, sum eru nevndir í tryggingarskjalinum og sum byggiharrin eigur ella hevur ábyrgdina av.

betri

# Arbeiðstøkutrygging

## 11.0 Tryggingarstaður
Tryggingarstaðurin er nevndur í tryggingarskjalinum.

## 12.0 Undantøk
Tryggingin fevnir ikki um:

**12.1** Konstruktiónir og anlegg, sum eru ein partur av arbeiðstøkuni, íroknað byggiharraveitingar.

**12.2** Miss og skaða á teir lutirnar, sum fáa beinleiðis skaða av ófullfíggjaðari viðgerð ella ófullfíggjaðari tilevning av teimum.

**12.3** Miss ella skaða orsakað av, at útinningin er í stríði við almennar forskriftir ella, at tað í ætlanunum fyri arbeiðið ikki eru gjørd forsvarlig fyrivarni móti skaða við gerð av trygdartiltøkum, íroknað avstíving og yvirbreiðing. Avstíving og yvirbreiðing skulu vera lagað til slagið av arbeiði, verandi bygning og tíðarskeiðið, tá arbeiðstøkan verður framd.

**12.4** Miss og skaða av tryggingarhendingum, sum vanlig trygging móti eldi og øðrum bygningsskaða fevnir um.

**12.5** Miss og skaða orsakað av tjóvaríi og herverki.

**12.6** Rakstrarmiss ella annan óbeinleiðis miss av øllum sløgum, íroknað rentumiss.

**12.7** Miss ella skaða orsakað av spreingiarbeiði.

# Deild III Ábyrgdartrygging

Tryggingin fevnir bert um ábyrgdartrygging, um tað er nevnt í tryggingarskjalinum.

## 13.0 Tryggingin fevnir um
**13.1 Byggiharri:**
**13.1.1** Tryggingin fevnir um endurgjaldsábyrgd, sum verður áløgd byggiharranum fyri skaðar á fólk ella lutir

- sum er ein beinleiðis fylgja av fysiska arbeiðinum í sambandi við ta arbeiðstøkuna, sum er lýst í tryggingarskjalinum,og

- sum eigari av ognini, sum er nevnd í tryggingarskjalinum og har arbeiðsplássið er.

**13.1.2** Tryggingin fevnir bert um endurgjaldsábyrgd fyri skaða á lutir, tá talan er um
- fyribils lækking av grundvatni
- niðursláing og niðurristing av pelum og spunsum
- uppdraging og uppristing av pelum og spunsum
- undirmúring og undirstoyping
- avstívingararbeiði
- niðurbrótingararbeiði

í sambandi við gerð av arbeiðstøkuni, og bert um Betri Trygging tá tryggingin var teknað, skrivliga var kunnað um, at tílík arbeiði skuldu gerast.

**13.2 Arbeiðstakari:**
**13.2.1** Um arbeiðstakarin er nevndur í tryggingarskjalinum, sum tryggjaður, fevnir § 13.1.2 eisini um arbeiðstakarans ábyrgd á sama hátt sum fyri byggiharran.

**13.2.2 Vinnuábyrgdartrygging:**
Tryggingin fevnir ikki um ábyrgd fyri skaða, sum vanlig vinnuábyrgdartrygging fevnir um.

Tað er ein treyt, at tann tryggjaði arbeiðstakarin í tryggingartíðini hevur teknað eina vanliga vinnuábyrgdartrygging.

## 14.0 Tryggingarhædd
**14.1** Hægsta endurgjald, sum Betri Trygging veitir, er avmarkað til ta í tryggingarskjalinum nevndu tryggingarhædd fyri eina tryggingarhending, ella røð av tryggingarhendingum, sum hava uppruna í somu hending, við frádrátti av ásettu sjálvábyrgdini. Um ábyrgdartryggingin fevnir um fleiri tryggjaði, er hon galdandi fyri hvønn einstakan, sum var sjálvstøðug trygging teknað fyri hvønn av teim tryggjaðu, tó uttan, at ábyrgdin hjá Betri Trygging verður økt.

**14.2** Harumframt rindar Betri Trygging rímiligar útreiðslur í sambandi við avgerð av endurgjaldsspurninginum, umframt rentur av dømdum endurgjøldum, hóast samlaðu útreiðslurnar fara upp um tryggingarhæddina.

## 15.0 Undantøk
Tryggingin fevnir ikki um ábyrgd:

**15.1** fyri skaða á lutir, sum tryggjaði hevur til láns, leigu, goymslu, nýtslu, flutnings ella sum av aðrari orsøk eru í varðveitslu hjá tryggjaða ella sum tryggjaði hevur ognað sær,

**15.2** fyri skaða á lutir hjá byggiharranum umframt fíggjarmiss í hesum sambandi,

**15.3** fyri skaða á lutir, sum arbeiðstøkan fevnir um umframt fíggjarmiss í hesum sambandi,

**15.4** sum fylgja av, at tryggjaði við avtalu ella á annan hátt hevur átikið sær eina víðari ábyrgd enn ta ábyrgd, sum fylgir av vanligu endurgjaldsreglunum uttanfyri sáttmála-viðurskifti,

**15.5** fyri miss orsakað av, at arbeiðstøkuarbeiðið ikki tænir sínum endamáli ella á annan hátt ikki er í samsvari við avtalaðu treytirnar,

**15.6** fyri skaða orsakað av varandi lækking av grundvatni,

**15.7** fyri skaða sum hendir við nýtslu av skipum, bátum ella øðrum sjógangandi førum,

**15.8** fyri skaða, sum lógarskyldugar ábyrgdartryggingar sambært lóggávu skulu fevna um,

**15.9** fyri skaða, ið tryggjaði ger við vilja,

**15.10** fyri skaða á lutir orsakaður av spreingiarbeiði.

## Felagstreytir

### 20.0 Tryggjaðu

**20.1** Tryggingin fevnir um tey, sum í hvørji deild eru nevnd í tryggingarskjalinum sum tryggjaði.

**20.2** Betri Trygging ger ikki aftursóknarkrav galdandi mótvegis skaðaelvara, ið er nevndur sum tryggjaður í tí deild, skaðin verður endurgoldin.

### 21.0 Felags undantøk

Tryggingin fevnir ikki um skaðar og ábyrgd fyri skaðar, sum beinleiðis ella óbeinleiðis standast av:

**21.1** kríggi, krígslíknandi viðurskiftum, hendingum, ið standast av at gera seg inn á uttanveltað, borgarakríggi, uppreistri, samanbresti, borgarligum ófriði ella tiltøkum til vernd móti hesum,

**21.2** verkfalli, verkbanni ella force majeure,

**21.3** NBCR-yvirgangi (Nuclear, Biological, Chemical & Radiological)
Við yvirgang er at skilja ein gerð/atgerð, íroknað - men ikki avmarkað til - brúk av makt og/ella harðskapi ella hóttan um, at makt og/ella harðskapur fer at vera nýttur, framd av einum ella fleiri persónum, uttan mun til um teir virka einsamallir ella í sambandi við ella í felag við ella vegna ein ella fleiri felagsskap/ir og/ella stjórnir og/ella myndugleikar, framd við politiskum, átrúnaðarligum, ideologiskum ella etniskum endamáli ella grundgeving, íroknað endamálinum at ávirka eina stjórn og/ella ein millumlandafelagsskap og/ ella at skapa ótta í almenninginum ella parti av almenninginum.

Í hesum sambandi veitir Betri Trygging ikki endurgjald fyri NBCR-yvirgang ella sokallaðar dálkaðar bumbur: Við dálkaðar bumbur er at skilja bumbur, rakettir o.tl. løddar við vanligum (konventionellum) spreingievni og dálkaðar við geislavirknum tilfari. Hesar bumbur verða vanliga nevndar dirty bombs. Sama er galdandi fyri bumbur, sum eru dálkaðar við evnafrøðiligum lívfrøðiligum ella bakteriufrøðiligum tilfari. Bumburnar gera skaða bæði við fysisku ávirkanini av sjálvum bumbubrestinum og við, at dálkað tilfar verður spjatt yvir eitt størri ella minni øki.

**21.5** jarðskjálvta, meldurhvirlu, melduródn, eldgosi ella aðrari náttúruvanlukku,

**21.6** atomkjarnureaktiónum, t.d. kjarnukloyvingum (fissión) og kjarnusamansmeltingum (fusión) og geislavirkni.

Skaði av kjarnorku til vanligt ídnaðarligt, læknafrøðiligt ella vísindaligt endamál verður tó endurgoldin, um so er, at galdandi fyriskipanir hava verið fylgdar og ikki hava staðið í sambandi við reaktor- ella acceleratorvirksemi,

**21.7** dálking, uttan so at skaðin er hendur óvæntað, ótilætlað og er eitt brádligt óhapp.

### 22.0 Broyting í arbeiðinum

**22.1** Tryggjaði skal beinanvegin geva Betri Trygging boð:

- um broytingar verða gjørdar í fráboðaða arbeiðsháttinum fyri arbeiðstøkuna, ella

- um broytingar verða gjørdar í tíðarætlanini ella raðfylgjuni av teim ymsu arbeiðunum í arbeiðsstøkuni, ella

- um arbeiðið steðgar heilt, soleiðis at arbeiðsplássið er

mannleyst í longri enn eina viku, soleiðis at Betri Trygging kann taka avgerð um tryggingin kann halda fram, og um so er, undir hvørjum treytum.

## 23.0 Skaðafráboðan

**23.1** Tryggjaði skal beinanvegin skrivliga boða tryggingarfelagnum frá skaða, ið mett verður, at tryggingin fevnir um, eins og hann skal lata tryggingarfelagnum allar upplýsingar og veita neyðuga hjálp soleiðis, at Betri Trygging kann meta um og gera skaðan upp.

**23.2** Verður skaðin afturgjørdur, áðrenn Betri Trygging hevur havt møguleika at sýna tað skadda, fellur rætturin til endurgjald burtur uttan so, at tryggjaði kann prógva støddina av og orsøkina til skaðan, og at tryggingin fevnir um skaðan.

## 24.0 Fráboðan av endurgjaldskrøvum

**24.1** Beinanvegin tryggingartakari fær at vita ella hevur varhugan av, at endurgjaldskrav verður sett fram móti honum, skal hann boða felagnum frá hesum.

**24.2** Viðurkenning av endurgjaldsskyldu og góðtøka av endurgjaldskravi kunnu bert gerast við samtykki frá felagnum, og felagið tekur annars avgerð um viðgerðina av endurgjaldsspurninginum.

**24.3** Í tann mun felagið hevur veitt endurgjald, yvirtekur felagið í øllum viðurskiftum rættin hjá tryggjaða til møgulig krøv mótvegis triðja manni.

## 25.0 Skaðauppgerð

**25.1** Skaði verður gjørdur upp sum vanligi kostnaðurin av neyðugari útskifting ella umvæling av skaddum lutum til tann stand, sum teir vóru í beint áðrenn skaðin hendi.

**25.2 Í skaðauppgerðina verður roknað:**

- útreiðslur til tilfar, arbeiðsløn, nýtslu av útbúnaði og aðrar neyðugar veitingar sambært vanligum takstum

- vanligur vinningur til arbeiðstakaran, sum ger skaðan aftur

- meirútreiðslur til neyðugar og vanligar arkitekta- og verkfrøðingasamsýningar

- útreiðslur til upprudding og burturbeining av skaddum lutum.

**25.3 Í skaðauppgerðini verður drigið frá fyri:**

- útreiðslur til fyribils umvæling, uttan so at tær føra við sær tilsvarandi minking av kostnaðinum av endaligu umvælingini

- virðið av skaddum lutum, ið kunnu nýtast aftur

- meirútreiðslur til yvir-, náttar- og halgidagsarbeiði, loft- og ekspressfragt ella aðrar sertakstir

- meirkostnað av at nýta tilfar av aðrari góðsku ella at konstruktiónin verður broytt orsakað av einum skaða

- útreiðslur hjá tryggjaða til trygdartiltøk, um tað kann vísast á, at orsøkin til skaðan ella støddina av skaðanum vóru at trygdartiltøk vantaðu ella vóru ófullfíggjað áðrenn skaðin hendi.

## 26.0 Sjálvábyrgd

**26.1** Um tryggingin er teknað við sjálvábyrgd, sæst tað á tryggingarskjalinum.

**26.2** Sjálvábyrgdin, sum er avtalað, verður drigin frá øllum skaðum. Eru skaðarnir fylgjur av fleiri hendingum, sum ikki hava samband hvør við aðra, er sjálvábyrgdin galdandi fyri hvørja einstaka hending, sjálvt um tey tryggjaðu verða varug við teir einstøku skaðarnar samstundis og/ella teir verða umvældir samstundis.

**26.3** Tá talan er um persónsskaðar er eingin sjálvábyrgd.

## 27.0 Trygdartiltøk fyri deild I og II

**27.1 Eldfimt arbeiði:**

Tað er ein treyt fyri fulnaði, at tá sveisað ella hitað verður, skal alt óneyðugt eldfimt tilfar burturbeinast frá økinum har arbeiðið fer fram. Ein brunavørður við sløkkiútgerð skal ansa eftir, meðan arbeiðið fer fram og verða á staðnum til brunavandin er av.

Neyðug sløkkiútgerð skal verða á staðnum har arbeiðið fer fram og kunna takast í brúk beinanvegin, um tað gerst neyðugt.

Fólk á arbeiðsøkinum skulu verða útbúgvin til at kunna handfara sløkkiútgerðina.

**27.2 Betongsaging:**

Tað er ein treyt fyri fulnaði, at tiltøk eru sett í verk fyri at samla og beina skerivatnið burtur, so hetta ikki skaðar verandi konstruktiónir og leysafæ á staðnum. Skorið skal

vera niður í hóskandi stórum lutum. Veggir og gólv skulu verjast, so tey ikki verða skadd av niðurtøku og skerivatni.

**27.3 Regn v.m.:**
Tað er ein treyt fyri fulnaði, um tryggingin skal taka við móti skaða av regnvatni, at ein pressending er breidd út yvir, tá farið verður frá arbeiði. Somuleiðis, at pressendingin er til taks, um regn kemur meðan arbeiði fer fram.

**27.4 Fráboðan um tjóvarí:**
Tá talan er um skaðar av tjóvaríi, er tað ein treyt fyri fulnaði, at tryggingartakarin eisini boðar løgregluni frá.

## 28.0 Felags trygdartiltøk

**28.1** Eftir ein skaða hevur Betri Trygging rætt til við einari viku ávaring eftir, at boðað er frá skaðanum at geva boð um trygdartiltøk, sum skulu vera sett í verk fyri at fyribyrgja ella avmarka skaðar av sama slag.

**28.2** Tað er ein treyt fyri tryggingarfulnaði, at arbeiðið verður framt eftir vanligum normum og trygdarreglum fyri slíkt byggverk, eins og at arbeiðsháttur og trygdarásetingar, ið eru nærri tilskilað í arbeiðsfrágreiðingini fyri arbeiðið verða yvirhildin.

## 29.0 Tryggingargjald

**29.1** Tryggingargjaldið fellur til gjaldingar, tá tryggingin kemur í gildi. Tryggingargjald verður kravt við inngjaldingarkorti. Betri Trygging tilskilar sær rætt til at krevja postgjald ella annan innkrevjingarkostnað.

**29.2** Verður tryggingargjaldið ikki goldið, í seinasta lagi tann dagin, ið er settur sum seinasta gjaldsfreist á kravinum, sendir tryggingarfelagið áminning við upplýsing um, at tryggingarfulnaðurin heldur uppat, um tryggingargjaldið ikki verður goldið innan eina nýggja freist. Tryggingarfelagið kann krevja eykakostnað fyri hesa áminning.

**29.3** Verður tryggingargjaldið framvegis ikki goldið, sendir tryggingarfelagið frásøgn um eftirstøðu, har boða verður frá avleiðingunum av eftirstøðuni.

Eins og fyri áminningina, kann tryggingarfelagið krevja eykakostnað fyri hesa frásøgn.

**29.4** Tryggingarfelagið skilar sær eisini rætt til at krevja straffrentu frá gjaldfreistini, verður ikki goldið áðrenn freistin er úti.

## 30.0 Uppsøgn

**30.1** Tryggingin kann av báðum pørtum sigast upp við einum mánaða skrivligari ávaring.

**30.2** Tryggingin kann upp í ein mánaða aftaná at skaðaendurgjald er uppgjørt ella eftir at skaðaendurgjald er avvíst, verða søgd upp av tryggingartakaranum/tryggingarfelagnum við 14 daga skrivligari ávaring.

**31.0** Angringarrættur fyri privatar tryggingar (brúkaratryggingar)

**31.1** Tryggingin kann verða strikað frá tekningardegnum, um tryggingarfelagið fær skrivliga fráboðan um tað, áðrenn 14 dagar eru farnir. Hetta merkir, at støðan verður, sum var tryggingin als ikki teknað. Møguligar útreiðslur, sum tryggingarfelagið hevur havt av tryggingini, kunnu krevjast afturgoldnar.

**31.2** Angringarrætturin er ikki galdandi fyri tryggingar, sum eru teknaðar fyri eitt tíðarskeið, ið er ein mánaði ella styttri.

## 32.0 Fyrning

**32.1** Tryggingin fevnir ikki um skaða, sum verður fráboðaður felagnum seinni enn eitt ár eftir at afturbøtingartíðarskeiðið er av.

**32.2** Tryggingartakarin missur rættin til endurgjald, um hann ikki leggur sak áðrenn 6 mánaðar eftir, at Betri Trygging skrivliga hevur noktað at veita endurgjald.

## 33.0 Onnur trygging

Er tað ásett í aðrari tryggingaravtalu, sum fevnir um sama vanda, at ábyrgdin fellur burt ella verður avmarkað, um trygging er ella verður teknað aðrastaðni, eru somu fyrivarni galdandi fyri hesa trygging.

## 34.0 Yvirsýn

**34.1** Er tvídráttur um skaðauppgerðina, kunnu tryggingartakarin og tryggingarfelagið avtala at lata skaðauppgerðina avgera av óheftum metingarmonnum.

**34.2** Metingarmennirnir skulu, áðrenn teir fara til verka, velja ein uppmann, sum eisini skal vera óheftur. Koma teir ikki ásamt um uppmann, velur sorinskrivarin hann.

**34.3** Metingarmennirnir gera uppgerðina í neyvum samsvari við ásetingarnar í tryggingartreytunum og -skjalinum

betri

## Arbeiðstøkutrygging

og gera eina skrivliga frágreiðing um, hvussu teir hava gjørt tapið upp.

**34.4** Yvirsýnið er endaligt og bindandi fyri báðar partar. Koma metingarmennirnir ikki ásamt um skaðauppgerðina, er tað uppmaðurin, ið innan fyri rammurnar av tí, ið metingarmennirnir eru komnir til, skal gera úrskurð í málinum. Avgerð hansara er tá endalig og bindandi fyri báðar partar. Metingarmennirnir avgera somuleiðis, hvussu kostnaðurin av yvirsýninum verður at býta millum partarnar.

### 35.0 Kærunevnd - Bert privatar tryggingar

**35.1** Eru viðurskifti við tryggingarfelagið, ið tryggingartakarin er ónøgdur við, t.d. í sambandi við skaða, kann hann venda sær til tryggingarkærunevndina.

**35.2** Ein treyt fyri at reisa mál fyri kærunevndini er, at tryggingartakarin fyrst hevur roynt at fáa í lag eina nøktandi loysn við tryggingarfelagið.

Eydnast tað ikki, skal skrivlig kæra - skrivað á donskum - sendast kærunevndini, saman við ávísum gjaldi. Um tryggingartakarin fær heilt ella partvíst viðhald verður gjaldið afturrindað.

**35.3** Eftir umbøn frá tryggingartakaranum sendir tryggingarfelagið útfyllingarblað og faldara hesum viðvíkjandi. Tryggingarfelagið er til reiðar við hjálp og vegleiðing viðvíkjandi kæruni.

Kæran skal sendast til:

35.4 Ankenævnet for Forsikring
Anker Heegaards Gade 2, 1.
Postbox 360
1572 København V.

Tlf. nr. : 0045 33 15 89 00
Fax nr. : 0045 33 15 89 10